# FRIÐARLIGUR AKTIVISTUR LÍVLANGT FONGSUL

# KINA

## Ilham Tohti




**Ilham Tohti virkaði ótroyttiliga fyri at byggja brýr millum fólkabólkar í Kina. Bæði á skrift og í fyrilestrum legði hann dent á, at hann als ikki tók undir við harðskapi. Heldur eggjaði hann til samstarv og samlag millum fólkabólkar. Men hann er fongslaður fyri lívið – fyri at birta upp undir etniskan tvídrátt.**

Ilham Tohti er ein virdur universitetsprofessari, sum er kendur fyri sínar hóvligu áskoðanir á ósemjur millum fólkabólkar í Kina. Kortini handtók politiið hann í januar 2014 í heiminum í Beijing.

Í fimm mánaðir hoyrdu familja og vinfólk hvørki orð ella eið frá honum. Hann fekk ikki matartugguna í 10 dagar, og føturnir vóru fjøtraðir í 20 dagar. Í septembur 2014 varð hann so dømdur lívlangt fongsul – fyri at birta upp undir fíggindskap millum fólkabólkar.

Ilham er av uighurfólkinum, einum í høvuðsheitum muslimskum fólkabólki, sum er fyri stórum mismuni í tí sjálvstýrandi landslutinum Xinjiang Uighur. Tvídrátturin millum fólkabólkar hevur vundið upp á seg tey seinnu árini, og tað er vorðið styttri ímillum teir harðligu samanbrestirnar.

Ilham stríddist støðufastur ímóti harðskapi og virkaði ótroyttiliga fyri at byggja brýr ímillum fólkabólkar. ”Leiðin, eg alla tíðina havi hildið, er reiðilig og friðarlig. Eg havi bara brúkt pennin og pappírið,” segði hann.

Við penninum og fyrilestrum varpaði hann eisini ljós á framferðarhættir hjá stjórnini, sum bóru í sær, at uighurfólkið var fyri mismuni á nógvum økjum.

Men nú er hann dømdur lívlangt fongsul. Hann verður miskunnarleyst revsaður fyri at finnast at politikkinum hjá stjórnini ímóti etniskum minnilutum.

**Krev, at nakað verður gjørt við støðuna. Heit á Kina um at sleppa Ilham Tohti leysum beinanvegin og treytaleyst.**

# ÁHEITANARBRØV

**Skriva fongsulsleiðaranum eini boð.**

**Byrja við: "Dear Director,"**

- Sig, hvørt tú ert, og hví tað ørkymlar teg, at Ilham Tohti framhaldandi situr í varðhaldi.
- Bið hann við tínum egnu orðum sleppa Ilham leysum beinanvegin og treytaleyst.

**Dømi um brævi:**

*Dear Director,*

*I am writing to express my concern about the continued detention of Ilham Tohti, who is being cruelly punished for peacefully defending the rights of Chinese minorities.*

*I ask that you immediately release Ilham Tohti without delay or conditions on his freedom.*

*Sincerely,*

## Send boðini higar:

Director Fan Jun

Prison Administration Bureau of
Xinjiang Uighur Autonomous Region

No.626 Xinquanjie, Tianshanqu
Urumqi

Xianjiang Uighur Autonomous Region

People's Republic of China 830002

# SAMHUGABRØV

**Vís Ilham Tohti tín stuðul:**

Send boðini higar:

Ilham Tohti
Xinjiang Uighur Autonomous Region No. 1 Prison
No. 215 Hebei Donglu
Urumqi, Xianjiang Uighur Autonomous Region
People's Republic of China 830013

**Vís Ilham Tohti tín stuðul.**

Send honum eitt bræv ella teldupost og fortel honum, at tú heitir á stjórnina um at sleppa honum leysum. Tíni boð gera myndugleikunum greitt, at heimurin sær.

# ÁHEITANARBRØV

**Endamálið** við einum áheitanarbrævi er at fáa móttakaran at fremja eina gerð, ið ger at rættindini hjá einum øðrum menniskja verða hildin. Ofta verða áheitanarbrøv send til myndugleikapersónar sum t.d. kongalig, forsetar, forsætisráðharrar ella borgmeistarar, tí hesir persónar hava skyldu til at taka sær av teimum brotum, sum henda.

**Orðaval** - í einum áheitanarbrævi hevur stóran týdning fyri um móttakarin tekur brævið í álvara. Tað er umráðandi at vera fólkaligur, óansæð hvat móttakarin hevur gjørt, ella kanska ikki hevur gjørt.

**Dagfesting** - fyri nær brævið hjá tær er skrivað. Dagfestingin verður skrivað ovast til høgru.

**Heilsan til móttakaran.** Brúka bara heitið á móttakaranum, t.d. Tygara kongaliga hátign, Frú forseti ella Hr. borgmeistari.

**Inngangur** - Stutt frágreiðing um endamálið við brævinum.

**Áheitan** - Kann eisini nevnast høvuðsteksturin í brævinum. Her verður greitt frá trupulleikanum og grundgevingunum fyri at móttakarin eigur at hjálpa við at loysa teir.

**Endi** - Tað er eitt gott hugskot at enda brævið fólkaliga, t.d. Vinarligar Heilsanir.

**Fulla navnið hjá tær.**

# SAMHUGABRØV

**Endamálið** við einum samhugabrævi er at geva móttakaranum eina vón og eina trúgv uppá at hansara ella hennara stríð fyri rættvísi fer at eydnast. Brævið vísir móttakaranum at hann ella hon ikki eru gloymd og ikki stríðast einsamøll, men at umheimurin gevur sær far um tey brot, ið ganga fyri seg og stríðist fyri at mannarættindini hjá móttakaranum verða hildin.

**Innihaldið** - Tað eru nógvir møguleikar fyri hvat tú kanst skriva í einum samhugabrævi, og hvussu tú kanst skriva tað. Tú kanst skriva stutt ella langt. Tekna eina mynd ella skriva eina yrking. Tað er púra upp til sendaran at royna at meta um, hvat hann heldur at móttakarin hevur brúk fyri at hoyra. Tann, ið fær eitt samhugabræv er ofta tann persónurin, sum er fyri brotum á mannarættindini.

Brævið kann eisini sendast til avvarandi hjá persóninum, sum er fyri brotum. Tað vil siga familju, vinir og líknandi. Í nøkrum førum er tað ikki gjørligt at senda samhugabrøv beinleiðis persónin, sum er fyri brotum, tí myndugleikarnir, ið standa fyri brotunum forða fyri tí.

**Dagfesting -** fyri nær brævið hjá tær er skrivað. Dagfestingin verður skrivað ovast til høgru.

**Heilsan til móttakaran.**

**Innihald -** Hygg at frágreiðingini omanfyri.

**Endi -** Tað er eitt gott hugskot at enda brævið fólkaliga, t.d. Vinarligar Heilsanir ella Kærar heilsanir.

**Fulla navnið hjá tær.**